## Minningarorð um ommu okkara

# Elinborg Sámalsdóttur Lervig

### f. 26.10.1930 - d. 27.12.2002



Vit vistu øll at tíðin var komin, at omma skuldi fara heim til Harran; men sjálvt tá eru boðini tung at fáa.

Alt sá annars ljóst út, tá hon kom heim úr Danmark fyrst í desembur, eftir drúgva viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum. Nú skuldi ganga stutt tíð og so skuldi alt ganga sína dagligu gongd aftur við matgerð, vitjanum og sunnudagsskúla. Men soleiðis bleiv tíverri ikki. Omma kom ongantíð fyri seg aftur eftir drúgvu viðgerðina. Eftir at hon var komin heim, hevði hon verið seingjaliggjandi heima í 10 dagar, tá læknin sendið hana til Landssjúkrahúsið. Tey kønu á økinum, sóðu hvønn veg hetta bar, men ikki fyrr enn 1. jóladag gekk tað upp fyri okkum, hvussu ring støðan veruliga varð.

Vit vildu øll heldur verið samlaði til tann siðvanda jóladøgurðan hjá abbasystur í Leirvík 2. jóladag, men lagnan vildi annaðleiðis. Vit samlaðust ístaðin runt um hennara sjúkralegu á Landssjúkrahúsinum. 3. jóladagur verður altíð í okkara minnum ein sorgardagur, tí tá fór omma heim til Harran.

At omma var ein áhugaverd og kend kvinna, kann staðfestast út frá tí stóra skara, ið fylgdi henni til sín síðsta hvíldarstað her á fold. Omma var eitt menniskja, ið fylti ein ógvuliga stóran part í okkara samveru. Hon dámdi serstakliga væl at vera við í samtalum og kanska hevur onkur av okkum ilskast inná tær heldur drúgvu søgur, ið hon greiddi frá. Men nú hevði ikki verið so galið, at fingið eina søgu afturat. Abbi hevur nokk følt seg nakað settan til síðis, tá okkurt av børnunum komu á vitjan. Tí tá tey fingu vitjan, varð ein "pleygaður", sum ein kongaligur.

Eg, Jóhan, var sum smádrongur nógv á vøllinum í Klaksvík og sparkaði. Ein dagin, tá eg kom heim, var eingin inni. Eg var svangur og tann einasta loysnin eg kundi koma fram til, var, at ringja út á Skála og biðja ommu geva mær at eta. Hetta hevur omma mangan fortalt mær síðani, og hon segði seg minnast hvussu hjálparsleysa hon føldi seg tá.

Eg, Bartal, og bróður, Borgar, vóru til arbeiðis á Skála Skipasmiðu og skuldu til døgurða á Strondum. Men tá komu boð, at vegurin var stongdur. Tá var bara eitt at gera og tað var at ringja til ommu og biðja um døgurða. Hon játtaði, sjálvt um abbi bara hevði gjørt døgurða til tey bæði. Abbi mátti noyðast við at hyggja at, meðan abbasynirnir leskaði seg við haruni, hann sjálvur hevði gjørt. Hetta vísur, sum áður nevnt, at abbi við hvørt var settur til síðis tá vit komu á vitjan.

Omma var ein listakvinna í hondarbeiði. Hon seymaði, vevaði, broderaði og bant. Og tað hevur verið til stóra fragd fyri okkum øll. Tá tær hvítu topphúgvurnar gjørdist kendar á sinni, varð skjótt at allir ommusynirnir fingu hvør sína. Vit eldru av syskunabørnunum hava fingið hvør sítt teppi og pútu og tey sum høvdu áhuga fyri tí, fingu ymiskt til føroysk klæði.

Tað sigst, at fá fólk duga at verða pensionistar, men omma og abbi hava dugað sera væl at liva lívið, eftir lokið arbeiðslív. Tey ferðaðust, vóru til legur og hugnakvøld saman við øðrum, tí tað er einki loynimál, at omma dámdi væl at verða millum fólk.

Hesi seinastu 5 árini, hevur sjúka fylt nógv í lívinum hjá ommu og abba. Omma gekk regluliga til kanningar og viðgerðar í Føroyum, og seinri í Danmark eisini. Abbi fekk ein stóra skurðviðgerð samstundis, so sigast kann, at tey hava havt úr at gera, við at stuðla hvørjum øðrum gjøgnum svárar tíðir.

Nú næstan tríggir mánaðir eru síðani omma fór heim, er enn líka stórur saknur á henni. Men vit vita, at hon sum ung genta tók ímóti Jesusi og tí samstundis vann sær eitt atgongumerkið til ta æviga lívið. Hetta gevur okkum, ið eftir sita, eina vón um, at vit aftur koma at síggjast einaferð.

Abbi, í tíni sorg og sakni, má Guð stuðla og hjálp tær á lívsleið tínari.

Vit vilja enda hesu fátøku orð, um eina ríka ommu við bíbliuversinum, sum er undirstrikað í hennara bíbliu: "Eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan." Fil. 4,13.

**Ommusynirnir, Bartal Danielsen
og Jóhan T. Lervig**

FISKIVINNUSKÚLIN
Í VESTMANNA

Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærarum at byrja á Fiskivinnuskúlanum 1. august 2003 í hesum lærugreinum:

**Støddfrøði D-stig** *(4 t/v)*
**Virkisbúskapur B-stig** *(6 t/v)*

Umsøkjarar til støddfrøði á D-stigi skulu hava hóskandi útbúgving, t.d. prógv frá læraraskúla. Í virkisbúskapi B-stig skulu umsøkjarar hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinini. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Tímarnir verða løntir sambært sáttmála millum Figgjarmálastýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara um lærarar á Fiskivinnuskúlanum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella frá Mentamálaráðnum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 10. apríl 2003.

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
fax 42 44 28
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo

# Setið ikki vindmyllur upp á Skorðhæddini

LANDSPLANLEGGING
*Jan Müller*

Í dag fer SEV at taka upp spurningin um at seta upp fleiri stórar vindmyllur á Skorðhæddini í Eysturoynni, har einasta vindmyllan hjá SEV er frammanundan. Ein av teimum, sum heldur tað vera skeivt at seta fleiri vindmyllur upp júst á hesum stað er fyrrverandi nevndarlimurin í FNU, Óli Mikkelsen. Sjálvur er hann fyri at menna vindorkuna í Før-oyum, men hann heldur vit eiga at vera varin og ikki seta vindmyllur upp, har vit í framtíðini møguliga skulu til at byggja flogvøll.

- Vit hava tørv á at byggja ein nýggjan og alternativan flogvøll, tí flogvøllurin í Vágum er ikki nøktandi sum er og tað verður alt ov kostnaðarmikið at útbyggja hann. Og her hava kanningar víst, at nettupp økið á Skorðhæddini í Eysturoynni er kanska tað besta at byggja nýggjan flogvøll á. Skulu stórar vindmyllur setast upp har nú, so forða fyri samtíðis fyri, at økið í framtíðini kann brúkast til flogvøll sigur Óli Mikkelsen.

Hann heitir inniliga á myndugleikarnar um hugsa um flogvallarmálið, nú tað verður tosað um at seta upp fleiri vindmyllur kring landið. Hann sigur, at bæðI tá talan er um at seta upp vindmyllur og at byggja ein nýggjan flogvøll í Føroyum, er tað ein avgerandi fyritreytin, at vit hava ein javnan vind. Og kanningar, sum eru gjørdar, vísa at slík pláss er Skorðhæddin við Toftir og Søltuvík í Sandoynni, tvey pláss, sum hava verið peikað út, tá talan hevur verið um flogvøll og um vindmyllur.

- Gott hevði verið, um flogvøllur og vindmyllur kundu verið á sama stað, men tað ber ikki til. Stórur tørvur verður óivað í framtíðini á góðum flogvølli og vindmyllum,, og pláss eigur at verða fyri báðum. Tveita vit vindmyllur út sum best ber til, koma vit at skíta okkum inni – tað var stór skomm á torvheiðunum. Vit skulu hugsa okkum væl um sigur Óli Mikkelsen. Hann heldur at flogvallarmálið eigur at endurskoðast. Vindmátingar skulu gerast við atliti bæðI til framtíðar flogvøll og framtíðar vindmyllur.

## Bilur til sølu



Nissan Primera 2.0i SE. Árg 98 koyrdur 58.000 km. Bilurin hevur airc, el rútar, leðursetur. 2 sett av felgum fylgja við.

Prísuppskot 130.000 kr.

**Ring 332006/210568**

# Bilar

Nr. 60 • hósdagur • 27. mars 2003 • 77. árg.

# Skoda Superb – bjóðar av í luksusklassanum

### Skoda Superb 1.8 T Comfort

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1.8 litur 4 syl. bensin v.turbo 150 hk |
| 0-100 km/t: | 9,5 sek |
| Bensinforbrúk: | 12,0 km/l |
| Dekkstødd: | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 480,0 cm |
| Breidd: | 177,0cm |
| Hædd: | 147,0 cm |
| Eginvekt: | 1425 kg |
| Totalvekt: | 2025 kg |
| Viðførisrúm: | 426 litrar |
| Prísur: | kr. 322.750 (metallakk + 8.000, serlakk + 4.000) |
| Søluumboð: | Sp/f Norðbil Oyggjarvegur FO-110 Tórshavn Tel. 313707 |




*Her er Frits Dam Jacobsen við nýggja Skoda Superb 1,8 T Comfort*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Innan minnir Superb um VW Passat*

**Ein av orsøkunum til at nýggi Skoda luksusbilurin hevur fingið Superb til eftirnavn, er at hann er uppkallaður eftir einum luksusbili við sama navnið frá 1934. Nýggi Superb skal kappast við luksusbilarnar í sínum klassa**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Skoda hava ikki altíð verið kendir fyri tað góða, tey flestu minnast niðurgerandi skemtisøgurnar um Skoda frá 80-unum. Men nú er av sonnum vent í holuni, nú eru Skoda farnir at bjóða av í luksusklassanum. Síðan VW konsernin yvirtók Skoda, eru teir so nógv broyttir, at í veruleikanum er talan um VW bilar við sjálvstøðugum modellum og búmerkjum. Skoda Superb, ið verður gjørdur á eini nýggjari bilverksmiðju í hjá Skoda í Tjekkia, er bygdur yvir ein 10 cm longdan VW Passat plattform. Suberb fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur, Classic, Comfort og Elegance. Bilurin er stórur og rúmligur við góðum beinplássi og stórum viðførisrúmi. Hann kann leverast við m.a. leðursetrum, Xenon-lyktum, automatgirum við Tiptronic og 17" alufelgum. Teir sum hava royndakoyrt Suberb, saman við øðrum bilum í sama klassa, eru komnir til ta niðurstøðu, at bilurin er tann rúmligasti í klassanum og koyrieginleikarnir eru á høgum støði. Eisini er hann sera væl útgjørdur sammet við prísin.

### Bensin og diesel

Á trygdarøkinum er einki undantak, har er alt, sum man kann vænta av einum bili í hesum klassanum sum t.d. airbag framman, í síðunum og gardinairbag. Standardútgerðin er eisini sera umfatandi sum t.d. koyritelda, kardanboks við innbygdari køliboks, varma í setrunum, lesilampur aftan og framman, førarasetur við memory, ljós í hurðahandtøkunum innan og CatVision, har øll økir á instrumentborðinum verða upplýst í myrkri, uttan at tað órógvar bilføraran. Listin yvir eykaútgerð er eisini langur. Superb fæst við seks ymiskum motorum, trimum bensin og trimum diesel. Bensinmotorarnir eru hesir: 2,0 litur 4 syl. við 115 hk, 1,8 litur 4 syl. v.turbo við 150 hk, 2,8 litur V6 við 193 hk. Dieselmotorarnir eru hesir: 1,9 litur 4 syl. TDI við 101 hk, 1,9 litur 4 syl. TDI við 130 hk, 2,5 litur V6 TDI við 155 hk.




*Í útsjónd er Skoda Superb ein blandingur av Skoda Octavia og VW Passat*